Sirið Stenberg
løgtingsmaður

Nr. 71/2019

Fyrispurningur eftir tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um fyribyrgjan av, at koronasmitta kemur inn í landið, settur løgmanni Bárði á Steig Nielsen (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Er ætlanin at kanna fólk fyri koronusmittu, tá ið tey koma til Føroyar ?
2. Hvussu ætlar landsstýrið annars at fyribyrgja, at smitta kemur inn í landið ?

Viðmerkingar:
Tað hevur á mangan hátt gingið væl at basa koronusmittuni í Føroyum. Nógv eru kannað, og nógv hava sitið í sóttarhaldi. Hetta hevur gjørt tað møguligt at fylgja smittuketunum og at fyribyrgja at smittan spjæðist víðari.
Í løtuni er ein stórur ótti fyri, at smitta verður innflutt til landið umvegis flogvøllin ella skipaferðslu. Samfelagið er við at lata uppaftur, og spurningurn er tí, hvussu vit á bestan hátt tryggja, at smitta ikki verður innflutt til Føroyar.

Á Løgtingi, 21. apríl 2020

Sirið Stenberg